KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000 . Fax. 410001

# Klaksvíkar Býráð

**Dagfesting:** 27.10.2022 kl. 17:30
**Nevndarlimir:** Karl Johansen, Atli S. Justinussen, Jógvan Skorheim, Símun á Høvdanum, Oddmar á Lakjuni, Jóhanna Christiansen, Eyðstein Ó. Poulsen, Annika S. Biskopstø, Óli M. Lassen, Signhild V. Johannesen og Tummas J. Lervig
**Varalimir:**
**Ikki møtt:**
**Onnur:** Rúni Rasmussen, kommunustjóri
**Protokollførari:** Jensa Anthoniussen, fulltrúi

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til viðgerðar** | | |
| 94/22 | 22/01758-1 | Norðoya Mentanardepil – v-tal 496898 – avtøka |
| 95/22 | 22/01648-2 | Sundurbýti av matr.nr. 820a ísv. neystabygging |
| 96/22 | 22/01487-6 | Umsókn um byggiloyvil til hjall, matr.nr. 1649a, Klaksvík |
| 97/22 | 22/01707-2 | Umsókn um byggiloyvi til íbúðabygging, matr.nr. 379, Klaksvík |
| 98/22 | 21/01328-12 | Vegur/parkeringsøki til raðhús o.o. hús omanfyri Stangavegin |
| 99/22 | 22/00584-39 | Nýgerð av elsta partinum, Fjallafípan - *eykajáttan 2022, fyrra viðgerð* |
| 100/22 | 22/01671-3 | Rokning frá Landsverki viðv. burturbeining av eyri og mold av tunnilsvegi í Árnafirði – *flyting millum kontur, fyrra viðgerð* |
| **Til viðgerðar fyri afturlatnum hurðum** | | |
| 101/22 | 21/01280-113 | Útstykking á Fossum |
| 102/22 | 22/01728-3 | Keyp av lendi |
| 103/22 | 22/01685-3 | Marknaumskipan og keyp lendi |

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000 . Fax. 410001

**Til viðgerðar**

## 94/22
## 22/01758-1 Norðoya Mentanardepil – v-tal 496898 – avtøka

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 18.10.2022 | 57/22 |
| 2 Fíggjarnevndin | 25.10.2022 | 76/22 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 27.10.2022 | 94/22 |

**22/01758-1 Norðoya Mentanardepil – v-tal 496898 – avtøka**

**Frágreiðing um málið:**
Grunnurin varð settur á stovn fyri 21 árum síðani við tí endamáli at fáa mentanarhús til býin. Nevndin kom við einum áliti um bygging av mentanarhúsi, men so hendi einki meira.

Grunnurin eigur eingi virði, og bankabókin varð gjørd upp 5. mars 2009.

Norðoya Mentanardepil er skrásettur hjá Taks (v-tal 496898) og skal tí lata inn sjálvuppgávu, og er hetta gjørt øll árini.

Sum kunnugt verður mentanarhús bygt nú, og í tí sambandi varð grunnurin Mentanarhúsið í Klaksvík stovnaður.

Nú annar grunnur hevur yvirtikið uppgávuna hjá Norðoya Mentanardepli, verður mælt til at avtaka grunnin.

**Lógargrundarlag:**
Kommunulógin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Tað hevur ongar fíggjarligar avleiðingar at avtaka grunnin.

**Tilmæli:**
Mælt verður til at avtaka grunnin Norðoya Mentanardepil.

**Mentanarnevndin 18. oktober 2022:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 10-10-2023.

**Fíggjarnevndin 25. oktober 2022:**
Nevndin tekur undir við MeN 18-10-2022.

**Klaksvíkar Býráð 27. oktober 2022:**
Tilmælið frá FíN 25-10-2022 einmælt samtykt.

## 95/22
## 22/01648-2 Sundurbýti av matr.nr. 820a ísv. neystabygging

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 17.10.2022 | 137/22 |
| 2 Havna- og Vinnunevndin | 19.10.2022 | K-17/22 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 27.10.2022 | 95/22 |

## 22/01648-2 Sundurbýti av matr.nr. 820a ísv. neystabygging

**Frágreiðing um málið:**
Í e-posti frá 19. sept. 2022 biður Umhvørvisstovan um býráðsins ummæli til sundurbýti av matr.nr. 820a í Klaksvík.

Talan er um frábýti av tí triðja av samanbygdu 6 neystunum sunnanfyri lendingina á Flesjum.

**Lógargrundarlag:**
Matrikullógin
Friðingarmyndugleikar (loyvi fyriliggur frá Yvirfriðingarnevndini 13. juli 2021)
Almenna Byggisamtyktin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar – kommunan bert tilmælandi.

**Tilmæli:**
Mælt verður til at viðmæla umsóknini, treytað av, at markið um frábýtta partin verður tillagað í tráð við veggin millum ábygdu neystini á økinum.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 17. oktober 2022:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 06-10-2022.

**Havna- og Vinnunevndin 19. oktober 2022:**
Málið verið til kunningar.

**Klaksvíkar Býráð 27. oktober 2022:**
Tilmælið frá UBN 17-10-2022 einmælt samtykt.

## 96/22
## 22/01487-6 Umsókn um byggiloyvil til hjall, matr.nr. 1649a, Klaksvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 17.10.2022 | 134/22 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 27.10.2022 | 96/22 |

## 22/01487-6 Umsókn um byggiloyvil til hjall, matr.nr. 1649a, Klaksvík

**Frágreiðing um málið:**
Borgari søkir um loyvi til at byggja hjall á 3,8 x 8 m á matr.nr. 1649a norðanfyri seyðhúsið.

Hjallurin skal verða brúktur í samband við virksemi umkring verandi seyðahús.

**Lógargrundarlag:**
D39 (Grønt øki) Økið er lagt út til park og náttúruøki.

Umsóknin skal sendast til Friðingarnevndina til ummælis.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar

**Tilmæli:**
Tekniska fyrisiting metir, at virksemið á økinum, ið er seyðahald, talar fyri at loyva einum tilhoyrandi hjalli norðanfyri verandi seyðahús.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 17. oktober 2022:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 10-10-2022.

**Klaksvíkar Býráð 27. oktober 2022:**
Tilmælið frá UBN 17-10-2022 einmælt samtykt.

## 97/22
## 22/01707-2 Umsókn um byggiloyvi til íbúðabygging, matr.nr. 379, Klaksvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Ferðslunevndin | 17.10.2022 | 60/22 |
| 2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 17.10.2022 | 136/22 |
| 3 Tekniska Nevnd | 19.10.2022 | 85/22 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 27.10.2022 | 97/22 |

### 22/01707-2 Umsókn um byggiloyvi til íbúðarbygging, matr.nr. 379, Klaksvík

**Frágreiðing um málið:**
Fyritøka søkir um frávik viðvíkjandi parkering til ætlaðu íbúðaverkætlanina á matr.nr. 379 (gamli HF bygningurin).
Bygningurin skal verða innrættaður til íbúðir og til handil á veghæddini.
Bruna- og orkukarmurin verður umvældur og dagførdur til at klára nútíðmans krøv.

Atkomumøguleikar við bili eru sera avmarkaðir. Bygningurin stendur tætt uppat øðrum bygningum, og er plássið niðanfyri avmarkað. Húsið hevur ongantíð havt parkeringspláss, og tað er heldur ikki gjørligt at gera parkering til hetta grundøki, í núverandi støðu.

**Lógargrundarlag:**
A5 (Minst 1 parkeringspláss pr. 40 $m^2$ grundvídd framvið Klaksvíksvegnum). Sambært ásetingum fyri økið, skulu í minsta lagi verða 9 parkeringspláss á økinum, Almenna byggisamtyktin og BK 17

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar

**Tilmæli:**
Tekniska fyrisiting metir, at øki A5 kann verða ovbyrjað viðvíkjandi trýst á parkeringsmøguleikum. Tað er tó til gagns fyri økið og kommununa, at tílíkir bygningar, staðsettir umkring miðbýin, verða umvældir og virknaðir. Tekniska fyrisiting mælir til at geva frávik viðvíkjandi parkering.

**Ferðslunevndin 17. oktober 2022:**
Ferðslunevndin staðfestir, at fleiri bygningar liggja kring Vágna við avmarkaðum ella ongum parkeringsplássum. Nevndin mælir tí til, at miðað verður eftir at hava nóg mikið av parkeringsplássum tøk í miðstaðarøkinum og økinum kring Vágna.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 17. oktober 2022:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 10-10-2022.

**Tekniska Nevnd 19. oktober 2022:**
Nevndin tekur undir við UBN 17. okt. 2022.

**Klaksvíkar Býráð 27. oktober 2022:**
Tilmælið frá TN 19-10-2022 einmælt samtykt.

## 98/22
## 21/01328-12 Vegur/parkeringsøki til raðhús o.o. hús omanfyri Stangavegin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 17.10.2022 | 141/22 |
| 2 Tekniska Nevnd | 19.10.2022 | 79/22 |
| 3 Fíggjarnevndin | 25.10.2022 | 80/22 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 27.10.2022 | 98/22 |

**21/01328-12 Vegur/parkeringsøki til raðhús o.o. hús omanfyri Stangavegin**

**Frágreiðing um málið:**
Í skrivi frá umsitingini 10. okt. 2022 verður greitt nærri frá málinum.

Í stuttum snýr málið seg um, at á fíggjarætlanini fyri 2022 eru settar 3,0 mió. kr. av til veg og parkeringsøki til raðhúsini o.o. omanfyri Stangavegin. Umframt avsetingina í ár hevur Klaksvíkar Býráð samtykt á býráðsfundi 24. februar 2022, at millum 3,0 og 4,0 mió. kr. skuldu setast av á fíggjarætlanini fyri 2023. Sambært hesum eru millum 6,0 og 7,0 mió. kr. settar av í alt til verkætlanina.

Ætlanin varð boðin út í 2020, og átti Norðhús lægsta tilboð, ið lá tætt upp at meting hjá ráðgeva. Afturat tilboðskostnaðinum skulu leggjast upphæddir fyri projektstýring, eftirlit, óvæntað, indexregulering o.a.

Samráðingar hava staðfest, at samlaða verkætlanin fer munandi upp um avsettu ella bundu upphæddina, og stavar økingin, fyri tað mesta, frá stórum prísvøkstri innan anleggsarbeiðir.

Fyrisitingin, leiðslan o.o. hava umrøtt málið, har ein samlað upphædd upp á 9,0 mió. kr. hevur verið nevnd. Niðurstøðan av umrøðuni var, at fyrisitingin skuldi koma við einum tilmæli um at fremja verkætlanina í 2022, 2023 og 2024.

Um verkætlanin skal fremjast sambært nýggju fíggjarætlanini, og sáttmáli undirskrivast við Norðhús yvir 3 fíggjarár, so er neyðugt at seta hesar upphæddir av í 2023 og 2024:
Upphædd, sum býráðið bindur seg til at seta av í 2023 - kr. 3.716.000,-
Upphædd, sum býráðið bindur seg til at seta av í 2024 - kr. 3.717.000,-

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Um ein arbeiðssáttmáli skal undirskrivast saman við Norðhús, er neyðugt, at Býráðið bindur seg til at seta niðanfyri standandi upphæddir av til verkætlanina í 2023 og 2024:
Upphædd, sum býráðið bindur seg til at seta av í 2023 er kr. 3.716.000,-
Upphædd, sum býráðið bindur seg til at seta av í 2024 er kr. 3.717.000,-

**Tilmæli:**
Við hesum verður málið lagt fyri viðkomandi nevndir og býráð til viðgerðar/støðutakan. Tekniska fyrisiting kann viðmæla, at arbeiðið verður framt sambært nýggju fíggjarætlanini fyri verkætlanina.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 17. oktober 2022:**
Ein meiriluti, OáL, SáH og SVJ, tekur undir við tilmælinum, dagf. 10-10-2022.
ASB tekur støðu í býráðnum.

**Tekniska Nevnd 19. oktober 2022:**
Nevndin tekur undir við meirilutanum í UBN, 17. okt. 2022.

**Fíggjarnevndin 25. oktober 2022:**
Nevndin tekur undir við TN 19-10-2022.

**Klaksvíkar Býráð 27. oktober 2022:**
Tilmælið frá meirilutanum í UBN 17-10-2022, TN 19-10-2022 og FíN 25-10-2022 samtykt við 10 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, OáL, SáH, JCC, EÓP, JS, SVJ, TJL og ÓML) og 1 atkvøðu ímóti (ASB).

**99/22**
**22/00584-39 Nýgerð av elsta partinum, Fjallafípan - *eykajáttan 2022, fyrra viðgerð***

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 17.10.2022 | 144/22 |
| 2 Mentanarnevndin | 18.10.2022 | 60/22 |
| 3 Trivnaðarnevndin Børn og Ung | 18.10.2022 | 50/22 |
| 4 Havna- og Vinnunevndin | 19.10.2022 | 52/22 |
| 5 Tekniska Nevnd | 19.10.2022 | 87/22 |
| 6 Fíggjarnevndin | 25.10.2022 | 77/22 |
| 7 Klaksvíkar Býráð | 27.10.2022 | 99/22 |
| 8 Klaksvíkar Býráð | 24.11.2022 | |

**22/00584-39 Nýgerð av elsta partinum, Fjallafípan - eykajáttan 2022**

**Frágreiðing um málið:**
Í mai og juni 2022 varð hetta málið lagt fyri avvarðandi nevndir, har nevndarsamtyktirnar, sum býráðið tók undir við eru fylgjandi:

- Tikið verður undir við fremjing av verkætlanini, sum lýst í tilmælinum frá umsitingini 08-06-2022 við broyttu tíðar-kostnaðarætlanini sambært notati 21-06-2022.
- Ca. 2,4 mió. kr. fella til gjaldingar í inniverandi ári (2022)
- Seinni helmingurin av verkætlanini verður framdur og fellur til gjaldingar í 2023, herundir yvirtøkan av leigumálinum/ognini hjá Ferðavinnuni í Norðoyggjum
- Fíggjarleisturin verður innan verandi fíggjarkarm

Vísandi til omanfyristandandi hevur borgarstjórin, trivnaðarnevndarformaðurin børn & ung og kommunustjórin heitt á umsitingina um at leggja fyri avvarðandi nevndir uppskot um fígging av hesi verkætlan í inniverandi ári við tilmæli um flytingar millum kontur.

Tað er við støði í hesi tilgongd, at hetta tilmælið verður lagt fyri sum uppskot við áheitan á avvarðandi nevndir um at gera evt. rættingar av upphæddunum, sum her verða skotnar upp at flyta millum kontur.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin, § 41: "*Kommunustýrið hevur játtanarmyndugleikan. Ikki kann verða farið undir eitt arbeiði, fyrr enn neyðug játtan er tøk.*"

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Vísandi til innleiðandi samskifti við politisku skipanina, verður mælt til niðanfyri standandi flytingar millum kontur til fígging av teimum íalt 2,4 mió. kr., sum henda verkætlan er mett at kosta í inniverandi ári:

| Rakstrarstað | Standardkonta | Núv. Játtan | Broyting | Broytt játtan |
|---|---|---|---|---|
| 1) 07381470141 Havnin (íløga) | 314120 Havnir (priv.arb.orka) | 13.400.000 kr. | -1.000.000 kr. | 12.200.000 kr. |
| 2) 06221170110 B. Búst. (íløgur) | B.Búst003 (Vegir til eldri sethús) | 2.400.00 kr. | -950.000 kr. | 1.450.000 kr. |

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000 . Fax. 410001

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 3) 05241370120 Ment.hús og bygdahús (íløgur) | Mentan006 | 3.000.000 kr. | -450.000 kr. | 2.550.000 kr. |
| 4) 03261170132 Barnaansing felags (Íløgur) | 313100 Bygningar, (privat arb.orka) | 700.000 kr. | +2.400.000 kr. | 3.100.000 kr. |

Viðmerkingar:
1) Henda upphædd verður flutt **frá** játtanini til dýping av Klaksvíkar havn.
2) Henda upphædd verður flutt **frá** játtanini til vegir til eldri sethús
3) Henda upphædd verður flutt **frá** játtanini til virksemið í Mentanarhús og bygdahús (íløgur)
4) Henda upphædd verður flutt ***til*** játtanina til nýgerð av Fjallafípuni

**Tilmæli:**
Mælt verður avvarðandi nevndum og býráðnum til at samtykkja tær í hesum tilmæli uppskotnu flytingar millum kontur í inniverandi fíggjarári (2022), og um neyðugt at gera rættingar í hesum uppskoti í tráð við politiska vilja býráðsins.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 17. oktober 2022:**
Ein meiriluti, OáL, SáH og ASB, tekur undir við tilmælinum, dagf. 07-10-2022.
SVJ tekur støðu í býráðnum.

**Mentanarnevndin 18. oktober 2022:**
Ein meiriluti, JCC, ASB og SáH, tekur undir við tilmælinum, dagd. 07-10-2022.
Ein minniluti, SVJ, tekur støðu í býráðnum.

**Trivnaðarnevndin Børn og Ung 18. oktober 2022:**
Ein meiriluti, JC, ASB og EÓP, tekur undir við tilmælinum, dagfest 07.10.22.
Ein minniluti, JS og TJL, tekur støðu í býráðnum.

**Havna- og Vinnunevndin 19. oktober 2022:**
Ein meiriluti, ASJ, EÓP, ÓML og OáL, tekur undir við tilmælinum, dagf. 07-10-2022.
Ein minniluti, TJL, tekur støðu í býráðnum.

**Tekniska Nevnd 19. oktober 2022:**
Ein meiriluti, ASJ, EÓP, ÓML og OáL, tekur undir við tilmælinum, dagf. 07-10-2022.
Ein minniluti, TJL, tekur støðu í býráðnum.

**Fíggjarnevndin 25. oktober 2022:**
Ein meiriluti, KHJ, ASJ og OáL, tekur undir við tilmælinum, dagf. 07-10-2022.
JS og TJL taka støðu í býráðnum.

**Klaksvíkar Býráð 27. oktober 2022:**
Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá FíN 25-10-2022; tað varð samtykt við 8 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, OáL, SáH, JCC, EÓP, ASB og ÓML), og ongari atkvøðu ímóti. JS, SVJ og TJL atkvøddu ikki.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000 . Fax. 410001

**100/22**
**22/01671-3 Rokning frá Landsverki viðv. burturbeining av eyri og mold av tunnilsvegi í Árnafirði – *flyting millum kontur, fyrra viðgerð***

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 17.10.2022 | 142/22 |
| 2 Mentanarnevndin | 18.10.2022 | 59/22 |
| 3 Havna- og Vinnunevndin | 19.10.2022 | 51/22 |
| 4 Tekniska Nevnd | 19.10.2022 | 80/22 |
| 5 Fíggjarnevndin | 25.10.2022 | 79/22 |
| 6 Klaksvíkar Býráð | 27.10.2022 | 100/22 |
| 7 Klaksvíkar Býráð | 24.11.2022 | |

**22/01671-3 Rokning frá Landsverki viðv. burturbeining av eyri og mold av tunnilsvegi í Árnafirði**

**Frágreiðing um málið:**
Greitt verður nærri frá málinum í skrivi, dagf. 7. okt. 2022.

Stutt kann sigast um málið, at tá Klaksvíkar kommuna seldi grótbrotið á Strond, varð neyðugt við nýggjum plássi, har kommunan yvir fleiri ár óavmarkað kundi taka ímóti mold og eyri.
Ein partur av málinum um móttøku av eyri og mold varð, at Vinnudeildin gjørdi avtalu við festara í Árnafirði, at moldin og eyrurin kundi leggjast á økið niðanfyri tunnilsmunnan í Árnafirði, har grót frá gomlu tunnilsverkætlanini í 60´unum var lagt.

Fyrisitingin hevði í 2021 eina vitan um, at rokning viðv. nevnda arbeiði fór at blíva send til Klaksvíkar kommunu í 2022. Peningur til hetta bleiv ikki settur av beinleiðis á fíggjarætlanaruppskotinum fyri 2022. Hetta var eitt mistak.
Tí verður málið nú lagt fyri avvarðandi nevndir og býráð til umfarið í oktober og november. Um ikki ber til at finna peningin innan fyri verandi fíggjarætlan, so má talan verða um eina eykajáttan.

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 77 frá 12. juli 1984 um bann móti burturkoyring av mold til sjós, har § 2 sigur, at øll býráð og bygdarráð hava skyldu til at ávísa øki, har mold og tilfar frá útgrevstrum og vegagerð o.t. kann leggjast.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Fíggjarárið 2022 nærkast endanum, og tí er tað ein avbjóðing at finna 1,72 mió. kr. innan fyri verandi fíggjarætlan.
Fyrisitingin leggur upp til, at fíggingin veður funnin við sparingum innan rakstur ella íløgur, innan ábyrgdarøkið hjá nevndunum, sambært kommunustýrisskipan kommununnar.

Uppskot:
HaVN - 860 tkr.
MeN - 430 tkr.
UBN - 215 tkr.
TN – 215 tkr.
Uppskotið gevur 1,72 mió. kr.

**Tilmæli:**
Við hesum verður málið sent viðkomandi nevndum og býráði til viðgerðar/støðutakan.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 17. oktober 2022:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 07-10-2022; fíggingin frá UBN verður at koma frá *Vegir til eldri sethús.*

**Mentanarnevndin 18. oktober 2022:**
Nevndin tekur undir við UBN, dagf. 17-10-2022; fíggingin 430 tkr verður tikin av játtanini (íløgur) til virksemið í Mentarnarhúsinum og Bygdarhús.

**Havna- og Vinnunevndin 19. oktober 2022:**
Nevndin tekur undir við MeN, dagf. 18-10-2022; fíggingin 860 tkr verður tikin av játtanini (íløgur) til Sølutorg

*ASJ luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.*

**Tekniska Nevnd 19. oktober 2022:**
*Atli S. Justinussen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.*

Nevndin tekur undir við HaVN 19. okt. 2022; fíggingin, 215 tkr., verður tikin av játtanini til *Vegir, íløgur.*

**Fíggjarnevndin 25. oktober 2022:**
*Atli S. Justinussen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.*

Ein meiriluti, KHJ, OáL og TJL, tekur undir við UBN 17-10-2022, MeN 18-10-2022, og HaVN og TN 19-10-2022.
JS tekur støðu í býráðnum.

**Klaksvíkar Býráð 27. oktober 2022:**
*Atli S. Justinussen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.*

Atkvøtt varð um sóljóðandi broytingaruppskot frá JS: "*Mælt verður til at taka upp samráðingar við byggifyritøkuna at fáa kostnaðin niður*"; tað fall við 6 atkvøðum ímóti (KHJ, OáL, SáH, JCC, EÓP og ASB) og 3 atkvøðum fyri (JS, TJL og SVJ); ÓML atkvøddi ikki.

Atkvøtt varð um tilmælini frá UBN 17-10-2022, MeN 18-10-2022, HaVN og TN 19-10-2022 og meirilutanum í FíN 25-10-2022; tey vórðu samtykt við 9 atkvøðum fyri (KHJ, OáL, SáH, JCC, EÓP, ASB, ÓML, SVJ og TJL) og 1 atkvøðu ímóti (JS)

**FRAMMANFYRI STANDANDI MÁL ERU VIÐGJØRD Á ALMENNUM FUNDI**

## 101/22
## 21/01280-113 Útstykking á Fossum

## 102/22
## 22/01728-3 Keyp av lendi

## 103/22
## 22/01685-3 Marknaumskipan og keyp av lend

Fundur lokin kl. 21.15